# Strandferðslan gjørt avtalu við spaniólar um nýtt suðuroyarskip

**Nýggja suðuroyarskipið verður verður liðugt í august í 2004**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Ætlanin er at undirskrivað sáttmálan um nýggju suðuroyarferjuna í næsta mánaði og ferjan verður liðug í august 2004*

Nú er tað endaliga greitt: Nýggja suðuroyarferjan verður bygd í Spania.

Fríggjadagin gjørdi Strandferðslan skrivliga semju við eitt skipasmiðjusamtak í Spania um at byggja nýggju ferjuna, ið skal røkja suðuroyarsiglingina fyri Smyril, sum er blivin ov gamal og slitin.

Talan er um samtakið IZAR, ið er eitt rættiliga stórt samtak av skipasmiðjum.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at í avtaluni við IZAR, er semja gjørd um ymiskar prinsipiellar spurningar í sambandi við bygginginа, og har staðfest verður, at partarnir skulu arbeiða fram ímóti at undirskriva endaligan sáttmála um bygginginа.

Eftir semjuni skulu partarnir arbeiða fram í móti at fáa tey seinastu teknisku og løgfrøðiligu viðurskiftini avgreidd í seinasta lagi 8. mars 2002.

Tá skal alt tilfar vera klárt, so at endaligur byggisáttmáli kann undirskrivast. Semjan er treytað av, at landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm, og partaeigarin í IZAR góðkenna byggikrøvini og endaligu avtaluna, áðrenn hon verður undirskrivað.

Reidar Nónfjall sigur, at tað, sum nú er eftir at gera, eru smálutir í einstakum orðingum í tekstum, sáttmálum og lógfrøðiligum skjølum.

### Samráðst í tveir mánaðir

Reidar Nónfjall sigur, at Strandferðslan og Vinnumálastýrið hava samráðst nú í einar tveir mánaðir samráðst við IZAR um nýggju suðuroyarferjuna suðuroyarferjuni.

IZAR samtakið hevur fleiri skipasmiðjur, men í sambandi við nýggju suðuroyarferjuna, eru tað tríggjar, sum kunnu koma upp á tal og tað eru skipasmiðjurnar í Sevilla, San Fernando og tann í Porto Real og tær eru allar í Suðurspania. Enn er endalig avgerð ikki enn tikin um, hvørjari av hesum trimum skipasmiðjnum, nýggja suðuroyarskipið verður bygt á.

Eftir avtaluni fer nýggja suðuroyarferjan at kosta 40.450.000 evrur og sum gjaldoyrað er í løtuni, er talan um 300, 5 milliónir krónur í okkara peningi.

Men harafturat koma so útreiðslur til kurstrygging og byggieftirlit.

Løgtingið hevur givið Vinnumálastýrinum heimild til at brúka 310 milliónir til skipið. Upprunaliga vórðu 305 milliónir játtaðar til endamálið, men Løgtingið hevur júst játtað fimm milliónir afturat til byggieftirlit og kurstrygging og sostatt eru nakrar milliónir til taks at standa ímóti við, skuldi onnurt óvæntað stungið seg upp á vegnum.

Ferjan verður goldin í trimum gjøldum, sum eru áleið líka stór, tó at gjaldið í ár verður nakað minni. Fyrsta gjaldið upp á 90 milliónir, verður goldið í ár, annað gjaldið komandi ár og triðja gjaldið í 2004.

Skipasmiðjan veitir trygd fyri hvørjum gjaldið.

Ferjan skal handast Strandferðsluni 30 mánaðir eftir, at byggisáttmálin er undirskrivaður.

Verður hann undirskrivaður í mars, soleiðis sum ætlanin er, verður nýggja nýggja suðuroyarskipið liðugt í august í 2004.

Fyri at taka afturíaftur, kann nevnast, at nýggja suðuroyarferjan verður 135 metrar long, hon siglur 21 míl, hevur pláss fyri 800 ferðafólkum og tekur 200 bilar og tað er tvær ferðir so nógv, sum Smyril.

# Strandferðslan fekk øll síni ynski uppfylt

**– Nýggja suðuroyarskipið verður akkurát, sum vit vildu hava tað, tí tað varð ikki neyðugt at skarva av ætlanini fyri at halda játtanina, sigur stjórin á Strandferðsluni**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*– Vit eru fegnir um, at vit ikki hava verið noyiddir at skarva nakað sum helst av upprunaligu byggiætlanini, sigur Reidar Nònfjall, Her er hann fundi í Suðuroy í fjør, tá ið umboð fyri Strandferðsluna greiddi almenninginum frá, hvussu nýggja suðuroyarskipið kom at síggja út.*

– Nýggja suðuroyarferjan verður akkurát, sum vit vildu hava hana.

Reidar Nònfjall, stjóri á Strandferðsluni er sera væl nøgdur við avtaluna, sum nú er gjørd við spanska skipasmiðjusamtakið IZAR hava um at byggja nýggja suðuroyarferju.

Strandferðslan hevur fingið heimild at brúka 310 milliónir til ferjuna.

Áðrenn arbeiðið at byggja ferjuna varð boðið út, hevur ein fyrireikingarnevnd undir Strandferðsluni gjørt eitt nágreiniligt yvirlit yvir tey krøv, sum skipið skal lúka.

– Og nú avtalan er gjørd við IZAR, kunnu vit ikki annað enn staðfesta, at tað ber til at byggja skipið, akkurát, sum vit ætlaðu. Sostattverður ikki neyðugt at skarva so mikið sum tað allarminsta av ætlanini fyri at fáa játtanina at halda, sigur Reidar Nónfjall.

Júst tað, at tað skuldi vera neyðugt at skarva av ætlanini fyri at fáa játtanin at halda, er eitt, ið summi hava stúrt fyri.

Tey minnast Sandoyarferjuna, sum varð bygt herfyri, tí har var neyðugt at kappa eitt sindur av her og har fyri at fáa prísin niður á tað, sum játtað var.

– Tí er spurningurin eisini viðkomandi í sambandi við nýggju suðuroyarferjuna, men eftir samráðingarnar við IZAr er tað greitt, at vit fáa akkurat tað loysnina, sum vit vildi hava og sum vit frammanundan útgreinaðu í yvirlitinum yvir tey krøv, skipið skuldi lúka og sum almenningurin eisini er kunnaður um.

### Fult álit á skipasmiðjuni

Ì sambandi við sjálva byggingina, gekk heldur ikki so væl við Teistanum, skrokkurin skuldi byggjast í Póllandi, men var seinkaður fleiri mánaðir.

Men slíkum trupulleikum stúrir strandferðslustjórin ikki fyri í sambandi við nýggju suðuroyarferjuna.

Hann sigur, at IZAR er eitt stórt samtak.

Teir hava bygt skip í heili 250 ár. Tað er tað næststørsta skipasmiðjusamtakið í Evropa, og tað níggjunda størsta í heiminum.

– Skipasmiðjan í Póllandi kunnu als ikki samanberast við tær hjá IZAR. Spaniólarnir eru vanir at byggja skip og byggja eisini skip til Føroyingar og aðrar norðurlendingar. Teir eru rættiliga frammaliga á økinum, so teimum havi eg fult álit á, sigur hann.

Hann sigur, at Strandferðslan og Vinnumálastýrið hava samráðast við IZAR í tveir mánaðir.

Felagið hevur nógvar skipasmiðjur, men í sambandi við nýggju suðuroyarferjuna, eru tað tríggjar skipasmiðjur í Suðurspania, sum kunnu koma upp á tal, tann í Sevilla, tann í San Fernando og tann í Porto Real.

Endalig avgerð er ikki tikin um, á hvørjari av hesum skipasmiðjum, ferjan skal byggjast.

– Í hesum sambandi hava umboð fyri Strandferðsluna og Vinnumálastýrið og vitjað á teimum trimum skipasmiðjunum, umframt á høvuðsskrivstovuna í Madrid.

– Endamálið var at síggja útbúnaðin hjá skipasmiðjunum, síggja ferjur og skip, sum IZAR hava bygt, og annars samráðast við skipasmiðjuna um verkætlanina.

Reidar Nónfjall sigur, at talan er um rættiliga framkomnar skipasmiðjur við ógvuliga nútímans útbúnaði, sum teir vóru hugtiknir av.

Annars varð tann møguleikin nevndur at byggja skipið í Kina, tí har skuldi tað kunna fáast einar 50 milliónir bíligari enn um tað var bygt i Evropa.

Men tann spurningin slapp Strandferðslan heilt frá at taka støðu til, hóast kinesiskar skipasmiðjur vóru ímillum teirra, sum vóru bodnar at geva tilboð.

– Vit fingu heilt einfalt onki boð úr Kina, sigur Reidar Nónfjall.

Annars fáast neyvari upplýsingar um IZAR á heimsíðuni, www.izar.es.



# Mentanarálitið útsett

**Í vikuni verða seinastu hoyringarnar avgreiddar, og síðani verður álitið gjørt klárt til at verða almannakunngjørt**

MENTAN
*Turið Kjølbro*



*Mentunarvirkisætlanin hjá landsstýrinum verður almannakunngjørd ein av fyrstu døgunum*

Eitt álit fyri og annað eftir er loyst úr lagdi seinastu árini, men enn bíða vit eftir álitinum um ein framtíðar føroyskan mentapolitikk. Undrunarvert kanska, tí farið varð undir at arbeiða við mentanarpolitisku virkisætlanini í byrjanini av hesum valskeiðnum. Valskeiðið er nærum runnið, men nú er álitið í eygsjón.

Álitið, sum er liðugt arbeitt av Mentamálastýrinum, er sent avvarðandi stovnum, feløgum og øðrum til hoyringar, og seint í hesu vikuni eru seinastu hoyringarnar avgreiddar. Síðani verða viðmerkingarnar viðgjørdar og álitið gjørt klárt til at verða almannakunngjørt. Ætlanin er at hava aðalorðaskifti um álitið í tinginum. Skotbráið er stutt, tí fyrst í komandi mánaði, sum longu byrjar í næstu viku, er seinasta freist at leggja málið fyri tingið.

Fýra landsstýrismenn í mentamálum hava havt álitið um hendi. Um tað er orsøkin til, at tað hevur tikið so drúgva tíð at seta orð á ein komandi føroyskan mentapolitikk, er ilt at meta um, men fleiri ferðir hetta valskeiðið hevur verið boðað frá, at álitið hevur verið á gáttini. So seint sum fyrst í hesum árinum ætlaði landsstýrismaðurin við mentamálum at hava álitið liðugt seinast í januar. Í viðtali í blaðnum í farna mánaði segði hann, at tað er torført at skriva eitt slíkt álit, sum umfatar so nógv.

- Nógvir stovnar og feløg eru umfatað og tað tekur tíð. Sjálvsagt er tað eitt sindur spell, at álitið kemur so seint í valskeiðnum. Hendan samgongan fær ikki teir stóru møguleikarnar at gera so nógv út frá álitinum, men tað fær komandi landsstýrið so ístaðin.

### Mentan kostar

Í samgonguskjalinum stendur, at ein greiður mentunarpolitikkur skal orðast við støði í millum øðrum mentunarálitinum "Avmarkaður marknaður", sum varð gjørt miðskeiðis í nítiárunum. Síðani henda samgongan fór til verka hava embætisfólk í Mentamálastýrinum arbeitt við virkisætlanini. Hvat stendur í virkisætlanini vil eingin avdúka fyri okkum. Ei heldur um, um virkisætlanin fer hava við sær, at meiri peningur verður settur av til mentan í komandi tíð. Fíggjarlógin fyri í ár gevur ikki nakra ábending um, at vit fáa ein orðaðan mentapolitikk innan stutta tíð. Játtanin til mentanina stendur stórt sæð í stað í ár í mun til í fjør. Tó vaks játtanin til mentanina í undanfarnu fíggjarlóg við tíggju prosentum í mun til árið fyri.

# Gamlir vinir vitja aftur

**Danskt spælimansorkestur, sum vitjaði í Føroyum seinasta summar, ætlar sær aftur hendanveg í summar**

TÓNLEIKAVITJAN



*Spælimansorkestrið Gamle Venner vitjaði í Føroyum í fjør og ætlar sær aftur í summar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Danska pensionistaorkestrið »Gamle Venner«, sum var í Føroyum og vitjaði seinasta summar, ætlar sær aftur í ár at spæla fyri føroyingum.

Talan er um eitt 12 mans orkestur, siga teir í tíðindaskrivi. Men bara teir níggju koma við í summar. Luttakararnir eru fyri tað mesta fólkapensionistar ella fyritíðarpensionistar. Teir plaga at halda til á einum sonevndum eldracentri í Trige beint norðan fyri Århus, nevnt Lokalcentret Bjørnshøj.

Seinasta summar búði ferðalagið í Tjørnuvík, meðan tey vóru í Føroyum, og tað fara tey aftur at gera í ár, verður sagt.

Tey ferðaust so runt til ellisheim, bústovnar og sambýli ymsastaðni og spældu fyri fólki.

Vanliga spæla teir - menninir spæla, meðan konurnar dansa - allan vanliga undirhaldstónleik frá seinastu øld, eins og gamlan fólkatónleik. Og tað ber so at siga altíð til at fáa fólk at dansa, verð ur sagt í tíðindaskirivninum.

Eisini bjóða teir seg fram at spæla til felagssang og enntá í kirkjum, um tað skal vera. Tað hava teir organist til, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Men teir spæla ikki ókeypis kortini. Nevnt verður, at teir rokna við at taka einar 1.500,- til 2.000,- krónur fyri hvørt tiltakið, teir spæla til.

Skuldi onkur verið áhugaður í at hoyrt hesar spælimenninar í summar, ber til at seta seg í samband við teir í Danmark, siga teir í tíðindaskrivinum. Til ber at ringja til tlf. nr. 0045 86 75 00 13 ella 0045 86 23 12 93 í Århus. Á fyrra nummarinum verður helst svarað á føroyskum.

Eisini ber til at senda teldupost - á føroyskum - til anbja@mail.dk

**ej**

# Findus, Kurt og kroppurin

**Smábarnabók, barnabók og myndabók eru útgávurnar hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags á hesum sinni**

ÚTGÁVUR
*Turið Kjølbro*

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur í hesum døgum út tríggjar bøkur. Smábarnabókin er "Mín fyrsta bók um kroppin", sum er væl egnað fyri børn í aldrinum 0 til 3 ár. Hetta er einføld smábarnabók, sum í fittum myndum vísir nøvn á likamslutum, t.d. hondini: tummil, fremstifingur, longutong, lekifingur, lítlifingur, knúgvi, handarbak og skøvningur. Eisini lærir barnið at seta orð á rørslur.

Bókin er 36 blaðsíður í litum, prentað á haldgott papp, og kostar 49 krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

"Tá ið Findus lítli hvarv" er myndabók, og væl egnað til 3 til 7 ára gomul børn. Sven Nordquist eigur orð og myndir. Hetta er fimta bókin á føroyskum um Pettson gamla og kettuna Findus. Hinar eru "Neyðars Pettson", "Pannukøkulagkøkan", "Pettson fær vitjan á jólum" og "Og hanin gól".

Í hesi bókini býr Pettson gamli saman við hønum sínum á einum garði á bygd. Hann kennir seg ógvuliga einsamallan. Ein dagin kemur grannakonan, Bina, við eini pappeskju til hansara. Á henni stendir við stórum stavum Findus Grønar ertrar, men í eskjuni er alt annað er ertrar. Nevniliga ein pinkalítil kettlingur.

Soleiðis gjørdust Pettson og Findus vinir, og teir fingu nógvar aðrar vinir eisini.

Bøkurnar um Pettson og Findus eru ógvuliga væl umtóktar, bæði í Føroyum og í øðrum londum.

Niels Jákup Thomsen hevur týtt úr svenskum. Bókin er 28 blaðsíður í litum, innbundin, og kostar 95 krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

Meiri er at frætta um stuttliga Kurt í bókini "Kurt Quo Vadis?" eftir Erlend Loe. Juli Fagerland hevur týtt. Bókin er væl egnað til børn í aldrinum 7 til 12 ár.

Í fjør komu tvær bøkur um Kurt, "Kurt og fiskurin" og "Kurt verður óreinur". "Kurt Quo Vadis" er seinasta bókin í røðini.

Kurt býr enn saman við konuni Onnu Lisu og børnunum Klænu-Helenu, Sodavatns-Kurt og Lítla Bud. Kurt kennir seg miseydnaðan. Ongin í verðini er meiri miseydnaður enn hann, soleiðis sum hann søplar lívið burtur á kajini, har hann koyrir trukk. Okkurt má gerast, og Kurt finnur upp á ráð. Hann sigur starvið sum trukkførari frá sær og fer at gera okkurt ógvuliga týdningarmikið, so at fólk skulu leggja til merkis til hansara. Einasti, sum stuðlar honum í tí, hann ger, er lítli Bud, og saman fáa teir enn eitt gott hugskot, men kanska varð tað ikki so gott kortini!

"Kurt Quo Vadis?" er 97 blaðsíður, kostar 95 krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.




